**Ársfrágreiðing frá Sjúkrarøktaretiska ráðnum**

Nevndi setti sær fyri at arbeiða við fylgjandi:

Arbeiðsætlan fyri árið:

- Ætla framhaldandi at arbeiða við at menna etiskt greinandi kompetensurnar hjá limunum.
- Arbeiða framhaldandi við at gera etiska ráðið sjónligt millum limirnar í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
- Arbeiða við at dagføra etisku leiðreglurnar, eins og samstarvið við felagið um viðgerð av lógum og reglugerðum, heldur fram.

**Menning av greinandi kompetensunum hjá limunum í ráðnum.**

Á regluligu fundunum hava limirnir greinað og viðgjørt etiskar tvístøður, sum limirnir sjálvir hava upplivað ella lisið í fakligum tíðarritum. Vit hava ofta sett okkum spurningin, hvussu tað ber til, at so gott sum eingin etisk tvíðstøða verður send ráðnum til viðgerðar. Hendan undran hevur ført til, at Sjúkrarøktaretiska ráðið fór undir eina kanning av hvussu sjúkrarøktarfrøðingar brúka yrkisetisku leiðreglurnar í praksis. [1] Kanningin er liðug og verður løgd fram í næstum.

Fakfeløgini í Svøriki, Noregi, Danmark og Føroyum hava sjúkrarrøktaretisk ráð. Hesi hava síðani 2005 fyrireikað og árliga hildið ráðstevnur um sjúkrarøktaretikk, har londini skiftast um at vera fyriskipari. Í ár var ráðstevnan í Svøríki og yvirskriftin á ráðstevnuni varð Jämlikhet. Evni varð lýst við fyrilestrum, uppleggi og orðaskifti í arbeiðsbólkum. Fyrilestrarnir vóru um "HBTQ och Jämlik vård", "Genus och jämlik vård", "Jämlikhet som fundament för etik i vården", "Etiska utmaningar i framtiden" og "Livstestamente och avstå/avslutande av behandling".

Nevndin í etiska ráðnum í Føroyum metir, at tað er umráðandi og gevandi, at limir taka lut á norðurlendsku etisku ráðstevnunum. Samanumtikið kann sigast, at vit fáa vitan og innlit í arbeiðið og arbeiðshættir at taka við okkum til okkara egna arbeiði, men tað er eisini mennandi at vita, at vit sjálvi hava góð ískoyti til felags menning. Vanligt er at 2 limir í ráðnum luttaka á Norðurlendsku etisku ráðstevnunum. Tað er serliga mennandi og gevandi fyri nevndina, tá ráðstevnan verður hildin í Føroyum, tí tá kann øll nevndin luttaka í ráðstevnuna.

**Gera Sjúkrarøktaretiska ráðið meira sjónligt millum limirnar**

Tað verður mett sera umráðandi, at Sjúkrarøktaretiska ráðið er sjónligt millum limirnar í felagnum. Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur eina tpost adressu, ið er: etikkur@sjukrarokt.fo

Sjúkrarøktaretiska ráði hevur lagt seg eftir at fáa prentað etiskar tvístøður í Vøku, ið ráðið hevur viðgjørt og greinað. Hetta er ein partur av at gera ráðið sjónligt millum limir felagsins og fyri at vísa á, hvussu limir felagsins kunnu brúka ráðið og tær etisku leiðreglurnar. [2]

---

[1] Sjá nærri frágreiðing í Vøku nr. 1 2012
[2] Sjá nærri í Vøku nr. 1 2012 og nr. 3 2012

**Dagføring av sjúkrarøktaretisku leiðreglum**

Arbeitt hevur verið við at dagføra etisku leiðreglurnar og dagføringar eru skrivaðar. Hesar skulu til viðgerðar á komandi aðalfundi. Sjá dagførdu leiðreglurnar aðrastaðni í blaðnum.

Tað er ógvuliga umráðandi, at limir felagsins kenna, at teir eiga part í orðingini av leiðreglunum og við tí eisini eiga part í innihaldinum av teimum. Tað er altíð vælkomið hjá limum at gera viðmerkingar/rættingar til leiðreglurnar og Sjúkrarøktaretiska ráðið hevur skyldu til at taka atlit at teimum.

Sjúkrarøktaretiska ráði hevur gjørt viðmerkingar og verði á fundi í Trivnaðarnevndini viðvíkjandi "Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om videnskabsetisk behandling af sundhedsvidenskabelige forskningsprojekter" og luttikið í hoyringsfund um "Etiskt ráð í Føroyum". Tað er bæði ynskiligt og aktuelt at gera viðmerkingar til lógaruppskot. Hetta er oftani trupult hjá ráðnum vegna væntandi arbeiðsorku.

**Framtíðarætlan**

Ætlanin er framhaldandi at fáa prentað upplivaðar ella lisnar etiskar tvístøður í Vøku, ið ráðið hevur viðgjørt og greinað.

Ætlanin er, at fara undir at lýsa hugtøkini, ið eru í Etisku leiðreglunum og fáa tað prenta í Vøku, fyri at gera hugtøkini meira felags og skillig og harvið stuðla brúkið av leiðregelunum og ráðið millum limirnar.

Arbeitt verður við at fáa lagt kanningina viðvíkjandi nýtsluni av yrkisetisku leiðreglum fram fyri limirnar í 2014.

**Nevndarlimir til sjúkrarøktaretiska ráðið.**

Valskeiðið hjá limunum sær soleiðis út. Súsanna Olsen og Maiken Olsen endurvaldar 2011 til 2015. Katrin Andreasen 2011 til 2015. Marjun Thomsen 2012 til 2016. Meta á Fløttum 2013-2017. Súsanna Olsen fer úr ráðinum vegna serligar umstøður, og fara vit at takka henni fyri hennara stóra arbeiði. Á seinasta aðalfundi blivu viðtøkurnar fyri Sjúkrarøktaretiska ráði broyttar soleiðis at veljast kann tiltakslimur til ráðið og ráðið fer tí at lýsa eftir nýggjum limi og tiltakslimi. Sjá aðrastaðni í blaðnum.